VR Bilar við Hoyvíksvegin:

# Góðar umstøður hjá starvsfólkum og kundum



VR Bilar við Hoyvíksvegin
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Stjórin í VR Bilum, Sverri Steintún, í nýumbygdu framsýningarhølunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Á bilasøluni VR Bilar við Hoyvíksvegin í Havn, sum umboða bilmerkini Renault og Volvo, er ein umbygging farin fram, sum gevur góðar umstøður til bæði starvsfólk og kundar**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilasølan VR Bilar við Hoyvíksvegin, ið skjótt hevur fýra ár á baki, er ein fyritøka í støðugari menning. Fyritøkan selur umleið 100 bilar um árið, og tað krevur nógv av starvsfólkunum og góðar arbeiðsumstøður.

Í fyritøkuni arbeiða 17 fólk í teimum fýra ymisku deildunum: bilasøluni, eykalutagoymsluni, lastbilaverkstaðnum og persónbilaverkstaðnum.

Ein umbygging er nýliga farin fram av framsýningarhølunum og skrivstovunum í niðastu hæddini, og eykalutagoymslan er flutt upp á miðhæddina, har plássið er tvífaldað og umstøðurnar munandi betur.

Stjórin í VR Bilum, Sverri Steintún, sigur, at teir nú hava gjørt hølini meira kundavinarlig. Framsýningarhølini eru størri, og pláss er nú til seks bilar.

Eisini eru nýggjar søluskrivstovur og kundamóttøka gjørd til verkstaðin. Ein hugnakrókur er í framsýningarhølinum, har kundarnir kunnu fáa sær kaffi og lesa bløð, meðan teir bíða eftir bilinum.

Sverri Steintún er væl nøgdur við umstøðurnar eftir umbyggingina. Hann sigur, at teir nú hava góðar umstøður at taka sær av kundunum og veita teimum eina tænastu, sum krevst av eini nútímans bilasølu.

# Hjólið á Shellstøðunum

**Hjólið, blaðið hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør er nú at fáa á Shellstøðunum kring landið. Í blaðnum eru nógvar myndir og áhugaverdar greinar**

TÍÐINDASKRIV




Hjólið er nú aftur at fáa á Shellstøðunum kring landið.

Í blaðnum hesaferð eru, umframt tíðindi frá felagnum, fleiri áhugaverdar greinar. Lesið m.a. um hvat hvalvíksprestur heldur um føroysku nummarpláturnar, Old Boys Buggie í Suðuroy, heimsins bestu bilar í 100 ár, ein pen-sioneraður sálarfrøðingur tekur ungdómsins ítriv framaftur, føroyingur á Ford T treffi í Norðurjútlandi.

Eisini eru greinar og myndafrásagnir um útferðir hjá felagnum í Gásadali, Selatrað og Kirkjubø

Hjólið er 16 blaðsíður við meira enn 50 litmyndum og kostar 20 krónur at keypa á Shell-støðunum.

Lesið Sosialin -so eru tit við!



# Býráðið vitjaði Ellisakfør

ELLISAKFØR
Maggi Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Týsdagin hevði Føroya Ellisakfør forkunnuga vitjan í gamla vatnbrunninum undir Gráasteini í Havn, sum felagið hevur til leigu frá Tórshavnar Kommunu.

Føroya Ellisakfør hava innrættað gamla brunnin til savn at hýsa ellisakførum. Hølini eru um 750 fermetrar til støddar, og hýsa í løtuni eini 35 ellisakførum, sum eru frá 1929 og fram í sjeytiárini.

Í sambandi við at Mentanarnevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur stuðlað felagnum við keypi av eini avfuktaraskipan, hevði felagið boðið býráðslimum og embætisfólkum at síggja umstøðurnar, nú felagið umsíðir trygt fær hýst ellisakførum undir góðum umstøðum.

Áðrenn avfuktaraskipanin varð sett upp í brunninum lá vætuprosentið millum 90 og 100. Undir slíkum umstøðum ferst metall illa.

Um vætuprosentið fæst niður á 57, steðgar øll tering. Við nýggju avfuktaraskipanini í gamla vatnbrunn-inum er vætuprosentið millum 56 og 60. Tá er luftin so turr, at einki metall rustar og einki stoff í bilinum modnar.



*Heðin Mortensen, býráðslimur, Heini á Borg, formaður í Føroya Ellisakførum og Jan Christiansen, býráðsformaður*



*Hildur Eyðunsdóttir og Elin Lindenskov, býráðslimir, Jens Marius Poulsen, býráðsskrivari og Jákup Simonsen, mentanarleiðari hjá Tórshavnar Býráð í savninum hjá Føroya Ellisakførum*



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg, Leðurinntrekk, Sóltak, El.-rútar, El.-spegl, Fj.-stýrt centrallás, Radio, Alufelgur, Spoylarar v.m. Sertilboð uttan bil í býti kr. 188.000.
Kr. 198.000.



**KIA CARENS 2.0 TURBO DIESEL**
Árg Sep.2002, Km 19.800. Air-condition, Alufelgur, Leður betrekk, Sleipikrók, Fjarstýrt centrallás, El.-rútar, El.-spegl v.m. (Alufelgur, Leður, krókur eykaútstýr) Tilboð uttan býtibil kr. 188.000. Kr. 200.000.



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition, Automatgear, Regnsensor, El.-stýrt førarasetur, El rútar fr.+ aftan, El.spegl, fjarstýrt centrallás, hita í forrúti, C.D.anlegg, Mjørkal.-Leður róður v.m. (Uttan býtibil: 188.800). Kr. 218.000
188.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakki-sensor - 4 WD v.Reduktiónsgear, Fjarstýrt centrallás, El.-rútar, El-spegl, C.D. Anlegg v.m. Tilboð uttan býtibil kr. 108.000. Kr. 118.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 72.600. El.-rútar. fr.- Radio v.bandspælara v.m Uttan býtibil tilboð kr. 75.000. Kr. 86.000.



**ROVER 620 TURBO INJECTION 200 HK**
Árg Jul-99, Km 94.000. Top modellið: 200 HK Turbo, Leður Inntrekk, Sóltak, Aircondition Alufelgur, C.D. Anlegg v.m. Tilboð uttan býtibil kr. 156.000. Kr. 168.000.



**OPEL ASTRA 1.6 STC. VØRUVOGNUR**
Árg Apr. 1999, Km 28.000. Bert koyrt: 28.000 km, fjarstýrt centrallás, Radio v.Bandspælara, Takboylar v.m. Uttan býtibil tilboð kr. 65.000. Kr. 75.000.



**LAST TIL PICK UP BILAR**
Sum nýggj Pick up Last við síðulúkum/aftan (MVG fæst aftur av prísinum) . Kr. 3.500.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650



**VOLVO AMAZON 121 1,7 BENSIN**
Árg okt.1965. **Ellisakfar** til sølu fyri Kr. 6.000.
**Boaz Jacobsen Norðragøta**
**Tlf. 2582777**

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50
T-postur: booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

HEIM TIL JÓLA?
SJÁLVANDI VIÐ NORRÖNU

Nú standa jólini aftur fyri durum, og tíð er at hugsa um at tryggja sær ferðaseðilin heim. Tilboðini frá okkum eru nærum ógjørlig at koma uttan um.

Ókeypis Buffet
Íroknað prísin er 1 x SCANDINAVIAN BUFFET á útferðini – stóra kalda borðið umborð.

| | |
|---|---|
| Fráferð Hanstholm: | 11.12 ella 18.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 30.12 ella 06.01 |
| Fráferð Seyðisfjørður: | 15.12 ella 22.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 27.12 ella 03.01 |
| Fráferð Lerwick: | 12.12 ella 19.12 |
| Fráferð Tórshavn: | 30.12 ella 06.01 |

PRÍSIR

| | |
|---|---|
| Lesandi ...... | úr kr. 680,- |
| Eftirlønt ..... | úr kr. 315,- |
| Lesandi ...... | úr kr. 870,- |
| Eftirlønt ..... | úr kr. 390,- |
| Lesandi ...... | úr kr. 475,- |
| Eftirlønt ..... | úr kr. 215,- |

**Prísurin fatar um** ferð annan vegin, íroknað 1 x Scandinavian Buffet á útferðini. Øll kømur hava wc/bað.

FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1
2 VAKSIN VIÐ BILI FRAM OG AFTUR

Á túrinum úr Danmark 11. des. spælir bólkurin BRIM. Á túrinum 18. des. spæla SØLVA OG BERGMENN

| | |
|---|---|
| ÚR DANMARK | BERT 3.270,- |
| ÚR ÍSLANDI | BERT 2.640,- |
| ÚR HETLANDI | BERT 1.680,- |

**Íroknað er:** Sigling fram og aftur í 2-koyggjukamari, innan, íroknað 1 x Scandinavian Buffet á útferðini.
Øll kømur hava wc/bað.

SMYRIL LINE